Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit E Nolsøe, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Starvsfólkatrot

Spurningar:

1. Hvussu nógvum starvsfólkum hevur Almannaverkið tørv á í løtuni?
2. Hvussu stórur er metti tørvurin á starvsfólkum í Almannaverkinum komandi árini?
3. Innan hvørjar starvsfólkabólkar er tørvurin?

Viðmerkingar:
Stjórin í Almannaverkinum var í miðlunum um dagarnar og greiddi frá, at Almannaverkinum tørvaði starvsfólk, og at tað merkti, at Almannaverkið hevði trupulleikar at røkja uppgávur.
Fyri at fáa greiðu á málinum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 06. januar 2022

Beinta Løwe